# Krabbaurð og Tjant

**Hjá teimum, sum troyttast av valinm, er nú høvi til eina lítla fríløtu fríggjakvøldið**

TILTAK
*tíðindaskriv*

Til tey ið vilja hava frí frá valinum og politikki, um ikki annað, so í tveir og ein hálvan tíma, er høvi til tess fríggjakvøldið 16. januar. Konsert og sjónleikur verður í Gamla Meiðarìi í Havn. Søgur úr Krabburð, ið hava gingið nú í seinastuni verða supleraðar við konsert við bólkinum Tjant.

Manningin í Tjant er sviðin Anders Hagberg á floytu og saksofon, Heðin Ziska Davidsen á gittar, Arnold Ludvig á bass og Brandur Jacobsen á trummum. Søgur úr Krabburð vera framførdar av Hans Tórgarð og Bárður Persson úr Grímu.

Ein fløga kom út í mei mánað 2003 á plátufelagnum TUTL undir heitinum Tjant. Løgini eru øll skrivað av Heðin Ziska Davidsen, og tónleikurin, ið verður framførdur fríggjakvøldið, er av hesi fløgu. Tá fløgan kom út í mei, var ikki gjørligt at fáa Anders Hagberg hendan vegin, hóast tað var ætlanin. Nú er hann her. So hetta er útgávu konsertin so at siga.

Søgur úr Krabbaurð byrjar klokkan 20.00 og hálvan annan tíma seinni verður so farið til tónleikin.



*Millum annað hevði kórið hjá Jóhan Mortensen jólakonsert í Fríðrikskirkjuni fyri jól*

# Kórið hjá Jóhan byrjar aftur

KÓRVENJING
*tíðindaskriv*

Leygardagin 17. januar byrja kórvenjingarnar hjá blandaða kórinum hjá Jóhan Mortensen aftur. Undan jólum hevði kórið - mannað við einum 35 sangarum - jólakonsert í Fríðrikskirkjuni, har m.a. sangir, ið Jim Reeves og Elvis Presley plagdu at syngja, vórðu framførdir saman við teimum vanligu tónleikarunum.

Nú verður so byrjað aftur við tí fyri eyga at hava eina konsert í mars-apríl. Fyrsta venjingin verður nú leygardagin í skúlanum í Runavík frá klokkan 15:00 til 17:30. Eydnast tað at manna kórið, verður hildið fram við venjningunum annanhvønn leygardag.

Kring landið er mangan torført at fáa kórini mannað, og tí er tað sjálvsagt, at nýggir sangarar eru vælkomnir upp í kórið.




Annika Olsen
valevni Fólkafloksins
í Suðurstreymoy

**Íløgur í tey ungu**

- Ríkt lestrarumhvørvi - útbúgvingardygd
- Fjølbroyttir møguleikar fyri list
- Betri møguleikar fyri ung við børnum, undir lestri
- Nýhugsandi loysnir fyri barnafamiljur á arbeiðsmarknaðinum

FÓLKAFLOKKURIN

WWW.ANNIKAOLSEN.NET



3 ár/ 100.000 km. virkistrygd, og 6 ára rusttrygd

Pininfarina, Italia, hevur teknað tann nýggja MPV frá HYUNDAI, ið er gjørdur til tað virknu familjuna. Innrættanin er smidlig við góðum plássi og gjørd til lagarligar loysnir, sum lætta um gerandisdagin. Ein sterk og sikkur kabina við útgerð, sum gevur tær kensluna av trygd. Motorveitingin er í topp, meðan brenniorka og ljóð eru lág. Alt hetta fæst fyri ein prís, sum er ótrúligur. Soleiðis er Matrix: Meira fyri minni

**Trygdarútgerð:** 4 airbags, elektroniskt forsterkaðar ABS-bremsur við EBD, síðustoytbjálkar úr hástyrkistáli, stoytdoyvandi tilfar í síðustolpunum, nakkastuðlar við hæddarinstilling og trýpunktselar, sum kunnu hæddarinnstillast og við kraftavmarking.

**Modellvariantar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1,6 GL bensin | 5 hurðar MPV | bert | **kr. 156.700,-** |
| 1,8 GL bensin | 5 hurðar MPV | bert | **kr. 169.700,-** |
| 1,5 GL. CRDI. diesel | 5 hurðar MPV | bert | **kr. 182.700,-** |

HONDA NORÐBIL ŠKODA HYUNDAI

BOX 1070 · OYGGJARVEGUR · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 313707 · FAX 310855





# Skil á:

- Búskapin
- Miðfyrisitingina
- Fiskimálaráðið
- Umhvørvisviðurskiftini



JAVNAÐARFLOKKURIN
- nakað fyri T